**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)
International Life Saving Federation (ILS)

Saltangará 11. juli 2024

Starvslýsing

# Aðalskrivari til Svimjisamband Føroya

Svimjisamband Føroya (SSF) leitar eftir aðalskrivara, at taka við hin 1. september 2024.

SSF er hægsti myndugleiki í øllum svimjiviðurskiftum í Føroyum. Endamálið er at menna og skapa áhuga fyri svimjiítróttina, at betra um heilsustøðuna og møguleikanum fyri lívbjargni, og at seta krøv til lívbjarging og trygd í sambandi við svimjing.

SSF virkar fyri samstarvi, tryggleika og trivnaði í føroyskari svimjing, so at sum flest kunnu íðka trygt á tí støði og við tí førleika sum viðkomandi hevur.

## Starvið

Aðalskrivarin hevur, saman við starvsnevndini, evstu ábyrgd av dagliga virkseminum hjá SSF.

Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna m.a. um vanligt fyrisitingarligt arbeiði, fundarluttøku og fyriskipan av tiltøkum SSF í Føroyum og uttanlanda, umframt samskipan og kunning til limafeløg, miðlar og aðrar áhugapartar. Ein týðandi partur av hesum er uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Hartil er ein vaksandi partur at gera stuðuls- og lýsingaravtalur, ofta við kravi um fíggjarætlan og eftirfylgjandi uppgerð, til dømis í sambandi við stuðulsgrunnar ÍSF og World Aquatics.

## Førleikakrøv og eginleikar

- Viðkomandi útbúgving er ikki ein treyt; men lat okkum hoyra hvørjar royndir tú hevur við fyrisiting, ella hvat sum ger at júst tú ert vælegnað/ur til hetta starv.
- Góð evni at lofta nógvum í senn, og at kunna seta seg inn í nýtt
- Góð evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum
- Góð evni at samskifta greitt á føroyskum og enskum í skrift og talu
- Góðir telduførleikar

## Vit bjóða

Eitt fjølbroytt og spennandi starv, har tú ert við til at seta dagskránna í einum av fremstu føroysku ítróttarfelagsskapum her og uttanlanda, við møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

## Løn og setanartreytir

Starvið er hálvtíðarstarv men við møguleika fyri fullum starvi. Arbeiðsstaðið er fleksibult, tó við regluligum uppgávum í Havn og Runavík. Løn og setanartreytir verða eftir nærri avtalu.

## Umsókn

Send umsókn, lívsrensl og avrit av møguligum prógvum til Rók í Jákupsstovu á rokur@ssf.fo, í seinasta lagi 8. august 2024 kl 12:00. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til sama.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

ATLANTIC AIRWAYS